Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Sernám

Spurningar:

1. Hvussu nógv av arbeiðsorkuni hjá Sernámi fer til ávíkavíst skúlaøkið, barnagarðsøkið og serøkið?
2. Hvussu nógvar pengar brúkar Sernám á hvørjum av hesum økjum?
3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at hækka játtanina til Sernám?
4. Hevur landstýrismaðurin ætlanir um at bjóða kommununum at verða partur av fíggingini av Sernámi fyri at styrkja stovnin?

Viðmerkingar:
Í løtuni viðger Løgtingið eitt uppskot frá Javnaðarflokkinum um økissálarfrøði. Uppskotið leggur upp til, at fleiri sálarfrøðingar kunnu verða partur av verandi skipan, sum virkar í dag.

Sernám hevur 7,2 sálarfrøðingar í starvi. Stovnurin hevur vegleiðandi, ráðgevandi og tilmælandi leiklut. Uppskotið hjá Javnaðarflokkinum leggur upp til ein viðgerðarpart í ymsu økjunum runt landið.

Sernám arbeiðir við børnum og ungum í aldrinum 0 til 18 ár, ið tørva hjálp til menning, læring og trivnað. Sernám hevur eina breiða servitan innan ymisk økir. Tað verður samstarvað við starvsfólk á dagstovnum og skúlum, og við foreldur og avvarðandi um at skapa felagskapir, har børn kunnu trívast, læra og mennast.

Hóast hetta eru bíðilistarnir at sleppa framat barna- og ungdómspsykiatriini á Landssjúkrahúsinum tvífaldaðir seinasta árið. Spurningurin er, um ikki summi av hesum børnum og ungum kundu verið loftaði av Sernámi.

Skulu fleiri sálarfrøðingar ella onnur við líknandi servitan setast í starv fyri at betra um tænastuna og røkka øllum landinum, skulu fleiri pengar setast av. Skal Sernám verða partur av einum tílíkum innsatsi, skulu fleiri pengar játtast til Sernám. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 23. apríl

Jóhannis Joensen